ítróttur

Nr. 103 • hósdagur • 03. juni 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

## FAKTA UM DYSTIN

**Holland-Føroyar 3-0 (1-0)**
Vinardystur, leiktur í Lausanne, Sveis
1-0: Rafael van der Vaart, 30
2-0: Roy Makaay, 51
3-0: Marc Overmars, 59
Holland: Edwin van der Saar (Roland Waterrues, 46.) – Michael Reiziger (Arjen Robben, 62.), Jaap Stam (John Heitinga, 46.), Wilfried Bouma (Frank de Boer, 46.), Giovanni Van Bronckhorst (Boudewijn Zenden, 46.) – Wesley Sneijder (Andey van der Meyde, 46), Philip Cocu (Paul Bosvelt, 46.), Rafael van der Vaart (Clarence Seedorf, 46.), Edgar Davids (Marc Overmars, 46.) – Ruud van Nistelrooy (Pierre van Hooijdonk, 46.), Patrick Kluivert (Roy Makaay, 46.)
**Føroyar:** Jákup Mikkelsen (Jens Martin Knudsen, 46.) – Arnbjørn Danielsen (Jónhard Frederiksberg, 62.), Óli Johannsen, Pól Thorsteinsson, Súni Olsen – Jákup á Borg, Atli Danielsen (Kári Nielsen, 65.), John Petersen (Pauli G. Hansen, 80.), Jann Ingi Petersen, Rógvi Jacobsen (Vagnur M. Mortensen, 90) – Andrew av Fløtum (Hjalgrím Elttør, 62.)
**Gult kort:** Arnbjørn Danielsen, 11
**Dómarabólkur úr Sveis**

Holland-Føroyar 3-0 (1-0):

# Góðkent avrik

**Holland vann væntaða sigurin á føroyska fótbóltslandsliðnum, men talan gjørdist ongantíð um nakra eyðmýking, og hóast tungu fráveruna, so stóð nýskipaði miðvøllurin royndina**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Einsamalli framherjin hjá føroyingum, Andrew av Fløtum, var bert sentimetrar frá at javna til 1-1 við einum dreymahøggi úr 30 metra fjarstøðu*

*savnsmynd*

Týskvøldið stóð føroyska fótbóltslandsliðið fyri einum av sínum allar størstu avbjóðingum nakran tíð. Gaman í var talan bara um venjingardyst, men við hollendsku megastjørnunum hinumegin miðlinjuna, er einki at taka seg aftur í, um onkur av føroysku leikarunum hevði hug at hveppast eitt sindur. Kluivert, van Nistelrooy, Davids og Cocu fyri bert at nevna nakrar, teljast allir millum virðismiklastu leikararnar í okkara heimsparti, og tá so føroyska liðið enntá var skert við avboðum frá millum øðrum báðum miðvallarmotorunum, vóru tað fleiri, sum høvdu alt annað enn góðar vónir undan dystinum.

### Óttin er burtur

Í so máta mundi dysturin týskvøldið geva eitt greitt tekin um, hvussu langt føroyskur landsliðsfótbóltur í veruleikanum hevur flutt seg. Eftir at fleiri av leikarunum mugu sigast at hava heilt drúgvar royndir á altjóða pallinum, eins og yngru menninir meira ella minni eru uppvaksnir við at spæla móti komandi stór.

Sjálvandi er virðingin fyri mótstøðuni til staðar – tað skuldi bara mangla. Men hon er ikki so ovurhonds stór, sum hon onkra tíð fyrr hevur verið, og kanska er tað einamest á áskoðarasíðuni, at hesin óttin fyri stórtapum og eyðmýkingum framvegis livir. Spælararnir hava í øllum førum ferð eftir ferð prógvað, at teir eru sína uppgávu vaksnir, og sum bæði nú- og fyrrverandi venjarin so ofta hava sagt, so kemur sensatiónin fyrr ella seinni.

### Hollendskt bóltflytarí

Men fyri at koma aftur til dystin, so var tað ikki so ofta sjónligt, at hetta vóru nakrir av heimsins bestu leikarum, sum okkara vóru uppi ímóti.

Fyrsta korterið ella har á leið tóktust okkara vera undir stórum trýsti, men tað er nú ikki so nógv meira enn tað, sum vit eru von við. Hesaferð kundi tó gingið galið, um ikki ein vinarligur sveisiskur linjuveri hevði vinkað van der Vaart rangstaddan, ella um Jákup Mikkelsen ikki hevði refleksbjargað royndini frá Cocu.

Men nullið helt sær á talvuni, og so líðandi byrjaði ferðin á hollendska spælinum at falla. Ein av orsøkunum til hetta mundi eisini vera, at føroyska liðið í nógvar mátar var sera væl skipað. Zonu-spælið í bæði verju og álopi riggaði nærum perfekt, soleiðis at okkara í stóran mun stóðu rætt, heldur enn at skula renna eftir mótstøðuni, og tí gjørdist talan í longum løtum um hollendskt bóltflytarí, sum sjáldan gjørdist veruliga vandamikið. Teir megnaðu nakrar ferðir at koma út á kantarnir, soleiðis at innlegg spurdust burturúr, men har sýndu Óli og Poul, at teir eins væl og Kluivert og van Nistelrooy kundu nýta ytru síðuna av høvdinum, og so spurdist ikki stórt meira burturúr.

Soleiðis sum spælið nú lagaði seg, so tóktist tað greitt, at onkur góð detalja skuldi til, fyri at opna føroysku verjuna, og hesari stóð ungi van der Vaart fyri á hálva tímanum. Súni Olsen fekk ikki tacklað nóg væl, tá ungi Ajax-leikarin tók ímóti við rygginum móti málinum, og eftir at hava snarað gøtumannin av sær, langaði hann til, og tó at Jákup var nær við, so fekk hann ikki vart fyri stiklandi bóltinum.

### Stjørnusett B-lið

Seinasta korterið av hálvleikinum gekk aftur meira ella minni í tómgongd. Hollendingarnir tóktust framvegis hava hug at fáa eyðkenda passing-spælið at koyra, men partvíst var ferðin ov lág til, at hetta skuldi opna føroyska liðið, og partvíst lupu okkara ongantíð framav, soleiðis at liðið kundi yvirspælast





*Skálamaðurin, Pauli Hansen h.m., slapp fyri fyrstu ferð at royna seg á føroyska landsliðnum í dystinum móti hollendsku stjørnunum*

uppi á vøllinum.

Til seinna hálvleik vóru stórar broytingar at síggja á hollendska liðnum. Broytingar av tí slagnum, sum ofta verða skuldsettar fyri at oyðileggja venjingardystir.

Dick Advocaat skifti nevnliga tíggju av ellivu leikarum út í steðginum, og einasti av teimum yvirlivandi – Michael Reiziger – var eisini skiftur út eftir góðum korteri, soleiðis at Holland eftir steðgin mest av øllum spældi við tí, sum má rópast eitt B-lið.

B-lið ella ikki, so gjørdi hetta ikki føroysku uppgávuna léttari á nakran hátt. Og tað sigur eisini nakað um hollendsku styrkina, at menn sum Seedorf, Overmars, Zenden og Makaay vóru at finna á sonevndu B-liðnum.

Ikki minst tóktist tað skapa nakað væl meira av ferð, at Seedorf nú var tann, sum skipaði hollendska spælið. Hann er kanska ikki ein eins eyðsýndur einstaklingur sum van der Vaart er tað, men hinvegin megnaði hann í nógv størri mun at seta ferð á bóltflytingarnar, og fleiri ferðir vóru okkara um ein háls, tá Milan leikarin tagaði føroysku verjuna upp við neyvu sendingum sínum.

### Andrew kundi selt seg

Og tað gav eisini at bíta seks minuttir eftir steðgin, tá Seedorf sendi Overmars avstað, soleiðis at hesin kundi leggja flatt til Makaay, men undan hesum hevði Andrew av Fløtum givið stjørnunum ein ordans skelk.

Føroyar høvdu valla havt tað, sum líktist einum veruliga gjøgnumspældum álopi allan dystin, og sum so var heldur ikki talan um nakran møguleika, tá Andrew fekk bóltin eftir fýra minuttum. Bouma mundi heldur ikki varnast vandan, tá hann bara skermaði einsamalla álopsmannin inn eftir vøllinum, men hann fekk annað at síggja. Onkra staðni millum 25 og 30 metrar úr málinum høgdi havnarmaðurin til, og sat skotið bara ein hálvan sentimetur lægri, so høvdu Føroyar javna. Ístaðin kundi ein spraklandi Waterraus í hollendska málinum gleðiliga staðfesta, at bólturin brast niður í svørðin fáar sentimetrar uttan fyri strikuna, og so slapp Holland undan ringastu eyðmýkingini. Veruliga eitt skot av tí slagnum, sum kann selja ein leikara, og so er spurningurin, hvørt onnur og størri feløg enn Fremad Amager fáa hug at síggja skotstyrkina hjá Andrew eftir hetta.

Fáar minuttir eftir hevði Makaay sum sagt økt um leiðsluna, og tá Overmars so við eitt sindur av hepni fekk eitt avrættað skot í føroysku meskarnar, var sigurin av álvara staðfestur.

Sokallaða B-ketan spældi seg eisini til fleiri aðrar møguleikar, og serliga Seedorf mundi ynskja Jens Martin langt burtur, men málverjin, sum nú aftur hevur topphúgvuna á høvdinum, gav fleiri dømi um, at hann framvegis er maður fyri at verja málið, tá altjóða uppgávurnar standa á skránni.

### Týdningarmiklar royndir

Og sum dysturin leið, so fekk seinni hálvleikurin eisini skapið av tí fyrra, tá talan í stóran mun gjørdist um bóltflytarí.

Hetta gav eisini føroysku venjarunum høvi til at seta nakrar ungar leikarar við fáum royndum inn á vøllin. Her kundi tað kanska tykjast heldur keðiligt, at Vagnur og Pauli ikki fingu meira tíð enn tað sama á vøllinum, men hinvegin var hetta eisini skilligt. Bæði tí venjararnir helst vildu halda John sum bindingarlið inni á vøllinum í dystinum longst gjørligt, og tí tað ikki varð hildið ráðiligt at gera nakrar broytingar í verjupartinum, har tað var mest upplagt at seta Vagn inn. Saman við Kára fingu teir báðir tó sín fyrsta landsdyst, og bara tað at vera við í hesum gevur so í øllum førum nakrar royndir, sum teir vónandi fáa gagn av seinni. Í øllum førum vita teir, at tú doyrt ikki, fyri tað um megastjørnur eru á mótstøðuliðnum, og bara vissan um hetta kann vera við at taka ringastu nervarnar burtur, tá teir næstu ferð skulu í altjóða eldin, og tað kanska standa týdningarmikil stig á skránni.

Samanlagt vóru teir í øllum førum við til at vinna føroyingum eitt úrslit, sum vit kanska ikki skulu vera beinleiðis errin av, men sum vit í øllum førum onga orsøk hava at skammast um. So tykist spurningurin bara vera, hvørt hollendsku miðlarnir fara at vera eins blíðir við sínar leikarar, tá avrikið skal vigast. Tað er í øllum førum einki at ivast í, at ætlanin var at fáa ein trivaligan sigur burturúr dystinum, og gjarna við bæði Kluivert og van Nistelrooy millum málskjúttarnar, men hesir dreymarnir vórðu so kortini av ongum.

# Vit kláraðu okkum væl

**Toftamaðurin í B36, Arnbjørn Danielsen, var týskvøldið við aftur á føroyska landsliðnum fyri fyrstu ferð í tvey ár, og hann var væl nøgdur við føroyska avrikið**

LANDSLIÐSPRÁT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



Mikumorgunin fingu vit umvegis fartelefonina fatur á Arnbjørn Danielsen, tá ið hann saman við restini av landsliðshópinum stóð í bíðirøð á flogvøllinum í Geneve at fáa sítt viðføri innskrivað.

### Stórt upplivilsi

Spurdur um hvussu tað var at verða aftur á føroyska landsliðnum, sigur Arnbjørn Danielsen: - Tað er altíð stuttligt at verða á landsliðnum, og tá ið mótstøðuliðið er Holland, er talan um eitt satt upplivilsi, sigur toftamaðurin, ið var á høgra bakki frá fyrsta bríksli. – Eg haldi eisini, at tá ið man spælir ímóti einum so sterkum liði sum Hollandi við so nógvum heimsstjørnum, so ræður tað um at njóta løtuna, sigur Arnbjørn Danielsen, sum gjørdist rættuliga bilsin, tá ið hann frætti, at hann var úttikin.

Um sjálvan dystin sigur Arnbjørn, at teir vóru fyrireikaðir upp á, at hollendingarnir vóru øgiliga sterkir, og tí var tað umráðandi hjá føroyingunum at verða væl skipaðir í verjupartinum. - Eg haldi, at vit kláraðu okkum væl, serliga fyri steðgin. Tó mistu vit luftina í byrjanini av seinna hálvleiki, tá ið teir senda eitt heilt nýtt og úthvílt lið á vøllin, sigur Arnbjørn og leggur afturat, at eftir hansara tykki var "b-liðið" hjá Hollandi betur enn "a-liðið". - Eg haldi til dømis, at álopsparið eftir steðgin (Roy Makaay og Pierre van Hooijdonk blðm.), komu betur frá tí enn Ruud van Nistelrooy og Patrik Kluivert gjørdu tað í fyrra hálvleiki. Hann heldur, at høvdu hollendingarnir ikki skift alt liðið út í steðginum, er væl møguligt, at úrslitið hjá okkum hevði verið enn betur.

Tá ið vit spyrja Arnbjørn, um man hugsar um, hvørjir leikararnir eru á mótstøðuliðnum, sigur hann: – Undan dystinum, tá ið man heilsar upp á mótstøðuleikararnar, bítur tú sjálvsagt merki í, at tað eru menn sum van Nistelrooy, Kluivert, Stam og Davids, sum tú skal dystast við, men tá ið dysturin er farin í gongd, hugsar tú ikki um tað, sigur B36-leikarin at enda.

# Góð roynd til dystin móti Fraklandi

**Rógvi Jacobsen, sum týskvøldið leikti sín dyst nummar 25 á føroyska landsliðnum, helt hollendska landsliðið verða nógv tað besta liðið, ið hann nakrantíð hevur leikt ímóti**

LANDSLIÐSPRÁT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



Klaksvíkingurin sigur í telefonini úr Sveis, at eftir hansara tykki var ikki so nógv at gera, tí hollendska liðið var so mikið sterkt.

### Nógv rennarí

Rógvi, ið sum vant leikt í vinstra borði á miðvøllinum, sigur: – Eg haldi, at vit kanska kundu staðið eitt sindur longur frammi á vøllinum, tí av tí at vit stóðu so aftarlaga, fingu vit als ikki skapt nakað frammi á vøllinum, tí tað var so langt niðan. Men teir eru øgiliga sterkir, og tí eru vit trýstir. Tað merkti so eisini, at tað hjá okkum gjørdist talan um rættuliga nógv rennarí uttan bólt, og tað merkist í beinunum í dag, sigur Rógvi Jacobsen.

Sjálvur heldur Rógvi Jacobsen, at saknurin var stórur í eitt nú Julian Johnsson og Fróða Benjaminsen á miðvøllinum, men hann sigur tó, at teir nýggju menninir komu stak væl frá uppgávuni.

Klaksvíkingurin í HB sigur eisini, at talan var um eitt stórt upplivilsi at leika móti hollendsku stjørnunum. – Tað eru kend nøvn, ið vit spældu ímóti, og tað er einki at ivast í, at hatta er nógv tað besta liðið, ið eg nakrantíð havi spælt ímóti. Tó haldi eg ikki, at vit vóru so nógv trýstir í fyrra hálvleiki, men í seinna hálvleiki stóð nógv á, sigur Rógvi Jacobsen, sum heldur dystin verða eina góða roynd undan dystinum móti Fraklandi í heyst.